


## Frá Sunda kirkjusókn – kirkjuráðsvalið

Kirkjuráðsval verður týsdagin 06.11.2001.

Vallistin fyri Sunda kirkjusókn liggur frammi til alment eftirlit í Streymbúðini við Norðskála allar gerandisdagar frá 23.08 til 31.08.

Møguligar kærur um ikki at vera á vallistanum, ella um at fólk, ið ikki hava valrætt, eru á vallistanum, skulu skrivliga sendast valstýrinum í seinasta lagi 08.09.2001.

Oyri 20.08.2001

**Valstýrið fyri Sunda kirkjusókn**

## Kunngerð um vallista til kirkjuráðsvalið

Sagt verður frá, at vallistin fyri Tórshavnar eystaru kirkjusókn til kirkjuráðsvalið, sum verður týsdagin 6. november 2001, liggur frammi í kirkjuskrivstovuni allar gerandisdagar frá 23.-31. august kl. 17-18.

Møguligar kærur um vallistan skulu verða skrivligar og sendar formanninum í valstýrinum í seinasta lagi 8. september 2001.

Tórshavnar, 21. august 2001

**Vegna valstýrið fyri Tórshavnar eystaru kirkjusókn**

Petur Jacob Sigvardsen formaður

## Sølumaður/ bilførari

Til útkoyring av sodavatni og øli av goymslu okkara søkja vit eftir bilførara við stóra koyrikortinum. Tað er ikki nøkur treyt, men umsøkjarar við royndum ella kunnleika innan sølu- og tænastuyrki hava fyrimun. Løn verður ásett í samráð við leiðsluna.

**Restorff's Bryggjarí**
**tlf. 314728**

## Mótmæli

7-manna bólkurin átalar harðliga málburðin hjá Sámal Peturi í Grund í samband við almennu eftirlønarskipanina, sum ikki kann skiljast annaleiðis enn, at fakfeløgini ikki skulu blanda seg í viðgerðina av hesum máli, fyrr enn tað er liðugt.

Fyri fakfeløgini er tað sjálvsagt at vera við í viðgerðini av eftirlønini frá byrjanini av.

**7-manna bólkurin**

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



## Frá Vesturkirkjuni
## Fráboðan um kirkjuráðsval

Kirkjuráðsval verður **týsdagin 6. november 2001**. Vallistin liggur frammi á skrivstovuni í kirkjukjallaranum allar gerandisdagar frá 23. til 31. august, kl. 17-18. Er onkur av misgávum ikki á listanum, skal viðkomandi siga frá innan 8. september.

Markið millum Tórshavnar vestaru og Tórshavnar eystaru kirkjusókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Valstýrið fyri Tórshavnar vestaru kirkjusókn**

## Frá Eiðis kirkjusókn
## Kirkjuráðsvalið

Kirkjuráðsval verður **týsdagin 06.11.2001.**

Vallistin fyri Eiðis kirkjusókn liggur frammi til alment eftirlit á Statoilstøðini á Eiði allar gerandisdagar frá 23.08 til 31.08.

Møguligar kærur um ikki at vera á vallistanum, ella um at fólk, ið ikki hava valrætt, eru á vallistanum, skulu skrivliga sendast valstýrinum í seinasta lagi 08.09.2001.

Eiði 20.08.2001

**Valstýrið fyri Eiðis kirkjusókn**

Block Watne

Dygdar sniðhús úr Noregi
ring og hoyr nærri
Sp/f Jensen
Tlf 22 64 27

www.sosialurin.fo

i
Sosialurin

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Samskiftisfólk

Eitt starv sum samskiftisfólk er leyst at søkja í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Samskiftið millum borgaran og Toll- og Skattstovu Føroya er nógv broytt seinastu tíðina. Eitt nú ber til at útfylla sjálvuppgávuna á telduni heima við hús, og upplýsingarnar verða móttiknar beinanvegin á Toll- og skattstovuni.

Eisini er samskifti millum Toll- og Skattstovu Føroya og útlendskar arbeiðsgevarar í stórum vøkstri, so neyðugt er á fleiri økjum at kunna samskifta eitt nú á enskum bæði munnliga og skrivliga. Stórur tørvur er á, at arbeiðsgongdir, daglig arbeiðsskjøl v.m., lógir, kunngerðir o.a.m., sum Toll- og Skattstova Føroya dagliga arbeiðir við, verða kunnað útlendingum so væl til ber á enskum máli.

Samskiftið er víðkað frá vanligum brævasamskifti til í størri og størri mun at fevna um samskifti yvir edvkervi, bæði úteftir við ty viðskiftafólk (serliga grannskoðarar, advokatar o.a.m), ið Toll- og Skattstova Føroya dagliga samskiftir við, og innanhýsis millum stýrið og tær 6 økisskrivstovurnar.

Tørvur er tí á einum fólki við fakligum førleika til at taka sær av hesum uppgávum og samskipa tær soleiðis, at allir borgarar í so stóran mun sum til ber fáa tær upplýsingar teimum tørvar um skatta-, mvg-, tollviðurskifti o.a., ið Toll- og Skattstova Føroya umsitur.

**Stýrið**
Stýrið hevur hesar uppgávur
- hægsta planlegging
- stýring, eftirlit og menning
- samskiftir við Landsstýrið og Toll- og Skattaráðið
- virkar sum ráðgevi hjá økjunum í fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, eftirlit og innkrevjing

Stýrið er skipað við eini stjórn og fimm deildum:
- Umsitingardeildin
- Virkiseftirlits- og Innheintingardeildin
- Menningardeildin
- Lógardeildin
- Kolvetnisskattadeildin

Undir stýrinum eru 6 Økisskrivstovur kring landið, ið hava alla dagliga fyrisiting av teimum rakstraruppgávum, ið eru lagdar til Toll- og Skattstovu Føroya at fyrisita. Arbeitt verður eisini við at leggja alla kolvetnisskattaumsiting til Klaksvíkar og Tvøroyrar.

**Starvið**
Verður skipað beinleiðis undir stjórnarskrivstovuni, og tað, sum liggur í starvinum er m.a. at
- marknaðarføra Toll- og skattstovuna sum ein tænastustovn
- menna kunningina til borgaran
- samskipa kunningina til økini
- samskipa týðing av arbeiðsgongdum, skjølum, lógum og kunngerðum o.a.m. hjá Toll- og skattstovuni til enskt mál
- hava ábyrgd av at dagføra heimasíðuna hjá Toll- og skattstovuni á Alnótini bæði málsliga og fakliga.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjari hevur royndir frá øðrum slíkum starvi. Harumframt vænta vit, at umsøkjari hevur hollan málsligan kunnleika og kunnleika um kunningartøkni, góð samstarvsevni, dugir væl at málbera seg skrivliga og munnliga, er fryntligur og fyrikomandi.

**Arbeiðsviðurskiftini**
- sjálvstøðugt starv
- samskifti við starvsfólk á øllum deildum stovnsins
- flex-tíð
- gott arbeiðsumhvørvi

**Setanartreytir**
Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastur á hesum støðum, um tað verður kravt.

Løn og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, verða eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Nærri frágreiðing um starvið** kann fáast við at seta seg í samband við Marjun Simonsen, stjórnarskrivara á tlf. 352600.

Starvið verður sett so skjótt til ber.

Seinasta freist at søkja er 10. september 2001, og umsóknir skulu sendast til

**Toll- og Skattstova Føroya**
Postboks 2151
165 Argir

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Í stýrinum eru fimm deildir: Eftirlits- og innheintingardeildin, Lógardeildin, Menningardeildin, Kolvetnisskattadeildin og Umsitingardeildin. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

BýIN
– HVøNN HóSDAG